# HEILSANIR



**Góðu mamma og Esben**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum 1. des. Eisini ein heilsan til abba. Alt tað besta ynskja
**Svanna, Andriása og Súsanna**



**Góða elskaða mamma**
Hjartalig tilukku við degnum tann 1 des. Takk fyri alt tú ert fyri okkum. Alt tað besta ynskja vit tær.
**Heilsan Kristian, Petur Martin og babba**



**Góða, elskaða systir**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum 30. nov. Nú ert tú blivin stór.
**Heilsan stórasystir**



**Góða, fitta Sandra**
Tillukku við 4 ára føðingardegnum.
**Bestu heilsanir omma og abbi**



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum á hjúnabandsdegnum 20. juli 2002.
**Annika og Jón**



**Asta Danielsen, Hoyvík**
Góða, fitta, elskaða Asta! Hjartaliga tillukku á 7 ára føðingardegnum ynskja,
**omma og abbi í Klaksvík**



**Góða, elskaða Beinta**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum í dag, 30. nov. Jesus signi framtíð tína ynskja
**mamma og babba**



Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt gjørdu hjúnabandsdag okkara 29. juni 2002 so minnisríkan og ógloymandi.
**Hanus og Mona**



**Hey Matlas**
Tillukku við 11 ára føðingardegnum 1. des.
**Svarti - Grái**



**Allarbesta omma**
Hjartaliga tillukku við árinum. Muss og klemm frá
**Hjalta, Mathias og Esben**

**PANASONIC**
Til sølu ein Panasonic EB-GD67 fartelefon, 1 mðr. gomul, einki brúkt, hevur WAP og litskerm, til sølu fyri 2400 kr.
*Tlf. 221421*

**TIL SØLU**
Seks vindeygu, B=120, H=100, til sølu fyri 400 kr. stk. Fimm vindeygu, B=120, H=65, 300 kr. stk.
*Tlf. 317442*



# FØÐINGAR

7. nov. fingu Karin Weihe og Lars Egehus, Holbæk, eina dóttir. Hon var 51 cm. og vigaði 3500 gr.

18. nov. fingu Dania og Arni Johansen, Vágur, ein son. hann var 57 cm.og vigaði 4150 gr.

19. nov. fingu Guðrun Debes og Thomar Hermansen, Porkeri, eina dóttur. Hon var 54 cm. og vigaði 4000 gr.

21. nov. fingu Heidi og Fróði Madsen, Herlev, Ein son. Hann var 48 cm. og vigaði 2390 gr.

22. nov. fingu Jannie og Petur Jacobsen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. og vigaði 3950 gr.

22. nov. fingu Reigun og Jens Hammer, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 57 cm. og vigaði 4315 gr.

22. nov. fingu Sylvia Hansen og Árni Thomassen, Hoyvík, tvíburar – synir. Tann eini var 50 cm. og vigaði 2700 gr. og hin var 53 cm. og vigaði 3200 gr.

23. nov. fingu Katrin og Bogi Jacobsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. og vigaði 3900 gr.

24. nov. fingu Krista og Sámal Hanne Lognberg, Skopun, eina dóttur. Hon var 51 cm. og vigaði 3000 gr.

24. nov. fingu Birgit og John Ryan, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. og vigaði 3750 gr.

25. nov. fingu Elin og Jógvan Jacobsen, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 55 cm. og vigaði 4000 gr.

26. nov. fingu Tinna og Jákup Johansen, Toftir, eina dóttur. Hon var 55 cm. og vigaði 3900 gr.

26. nov. fingu Jonna Fritsdóttir Mortensen og Jens Heri Bolstad Mortensen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 58 cm. og vigaði 4500 gr.

27. nov. fingu Nansy og John Simonsen, Sørvágur, eina dóttur. Hon var 51 cm. og vigaði 3600 gr.

28. nov. fingu Sunrid og Martin Johannessen, Saltnes, eina dóttur. Hon var 56 cm. og vigaði 4325 gr.

28. nov. fingu Sunneva Davidsen og Jóannes Madsen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 54 cm. og vigaði 4200 gr.

# ANDLÁT

**21. november**
Beata Jacobsen, Syðrugøta ættað úr Fuglafirði, 77 ár

**22. november**
Marius Gardshodn, ættaður úr Elduvík, búsitandi í Havn, 68 ár

**23. november**
Jensia Olsen, Klaksvík, fødd Mikkelsen, ættað úr Skúvoy, 82 ár
Steingrím Nielsen, Tórshavn, 71 ár

**24. november**
Heini Joensen, Tvøroyri, 40 ár

**25. november**
Heine Heinesen, føddur Johansen, ættaður úr Miðvági búsitandi í Keypmannahavn, 70 ár
Jógvan Hansen, í Vestmanna, 104 ár
Hans Mortensen, Tvøroyri, vanliga nevndur Hans hjá Palla, 86 ár

**26. november**
Villiam Hansen, ættaður úr Kollafirði, búsitandi á Velbastað, 51 ár
Ingibjørg Mikkelsen, fødd Sørensen, ættað av Húsum búsitandi í Havn, 83 ár
Elsa Jacobsen, í Vági, 90 ár

**27. november**
Anna Sofía Petersen, Vestmanna 93 ár
Louisa Mellemgaard Jacobsen, fødd Christiansen, ættað úr Skálavík, bús í Klaksvík, 78 ár
Olga-Mari Viðberg Joensen, Haslev, fødd í Havn, 41 ár

# TILTØK

**Gudstænastur 1. sunnud. í advent**
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sonja Klein. Talvan gongur fyri hina føroysku sjómanskirkjuna
*Í Nólsoy og Kaldbak* gongur talvan fyri føroysku sjómanskirkjuna
*Vesturkirkjan:* kl. 11, Familjugudstænasta, Musikkspælistovan og Ung Stjørnuskot syngja, Bergur D. Joensen
*Argir:* kl. 11, Familjugudstænasta, Barnakórið syngur, Heri Joensen
*Kirkjubøur:* kl. 12.15, Heri Joensen. Talvan gongur í Suðurstreymoyar vestara prestagjaldi fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Vestmanna:* kl. 12, altarg., Inga P. Dam
*Miðvágur:* kl. 12, altarg., David Johannesen, (Vágakórið syngur)
*Kvívík:* kl. 12, Marjun Bæk
*Kollafjørður:* kl. 16, familjugudstænasta við altarg., Marjun Bæk (í sambandi við adventshugna í missiónshúsinum aftaná). Í øllum kirkjum í Norðstreymoyar prestagjaldi gongur talvan fyri føroysku sjómanskirkjuna
*Glyvrar:* kl. 11, altarg., Messuaklar verða tiknir í brúk. Talvan gongur fyri føroysku Sjómanskirkjuna
*Rituvík:* kl. 19, Teir sjey lestrarnir, Meinhard Bjartalíð. (Aftaná verður adventshugni í missiónshúsinum)
*Eiði:* kl. 11.40 skriftamál, kl. 12 messa
*Norðskála:* kl. 17 ljósgudstænasta, Emil Olsen. Talvan gongur í øllum kirkjum í Eiðis prestagjaldi fyri hina Føroysku Sjómanskirkjuna
*Sjóvar kirkja:* kl. 12, Erland Beder. Kl. 17 Ljósmessa
*Skála:* kl. 11, altarg., Kjartan Mørkøre
*Oyndarfjørður:* kl. 12, altarg., Sverri Steinhólm
*Selatrað:* kl. 12, altarg., Hans J. Joensen, biskupur. Talvan gongur í øllum kirkjum í Sjóvar prestagjaldi fyri hina Føroysku Sjómanskirkjuna
*Fríðrikskirkjan:* kl. 14, familjugudstænasta (børn úr Barnaringinum taka lut) Martin R. Jacobsen
*Gøta:* kl. 15, familjugudstænasta, Sonja Klein. Talvan gongur fyri barnaarbeiði
*Tjørnuvík:* kl. 12, altarg., Bjarni Bæk. Talvan gongur fyri sjómanskirkjuna
*Dalur:* kl. 12, altarg., Jákup R. Hansen. Talvan gongur í Sandoyar prestagjaldi fyri Hini føroysku Sjómanskirkjuni
*Hov:* kl. 11,
*Hvalba:* kl. 12.30. Talvan gongur til frama fyri sunnudagsskúlan, Ólavur Rasmussen
*Tvøroyri:* kl. 11, familjugudstænasta, Jónsvein Bech
*Porkeris kirkja:* Talvan gongur fyri Føroysku Sjómanskirkjuna
*Leiti:* kl. 12,
*Vágur:* kl. 14, Barna/familjugudstænasta, Marianne Telling
*Christianskirkjan:* kl. 11, altarg,. Hans Eiler Hammer
*Klaksvíkar sjúkrahús:* kl. 10, Elsa Funding
*Árnafjørður:* kl. 11, altarg.,
*Norðoya Røktarheim:* kl. 14.30, Niels Pauli Danielsen
*Viðareiði:* kl. 17, Elsa Funding. Í Norðoya eystara prestagjaldi gongur talvan fyri føroysku sjómanskirkjuna
*Leirvík:* kl. 12, familjugudstænasta, Martin R. Jacobsen. Í Fuglafjarðar prestagjaldi gongur talvan fyri sjómanskirkjuna

**Lívdin**
Samkoman Lívdin hevur familjumøti kl. 10.30 og tilbiðjanarmøti, kl. 12.00 hvønn sunnudag í Hoyvíkar skúla. Barnaansing er undir báðum møtunum og sunnudagsskúli er kl. 12. Millum møtini er drekkamunnur.

**Ebenezer**
Sunnudagin kl. 10.00 Breyðbróting, kl. 12.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. møti.
Mikukvøldið kl. 20.00 Byrjar møtirøðin, evnið henda mánaðin er Dánielsbók.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Hebron, Argir**
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti. Ímeðan er skipað barnaansing, kl. 12.00 Sunnudagsskúli og samstundis kl. 12.00 Møti.

**Katólska Kirkjan**
Leygardagin kl. 11.30 Messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11.00 Hámessa í Mariukirkjuni. Aftaná verður kirkjukaffi, kl. 14.00 Sunnudagsskúli.

**Meinigheitshúsið**
Leygarkvøldið kl. 19.30-22.00 Juniorhugni fyri 6. flokk og eldri.
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Hans Eiler Hammer.

**KFUM og KFUK í Havn**
Sunnudagin kl. 19.30 í KFUK: Adventsfest. Inngangur við Henning Nielsen, presti. Kristiliga sangkórið luttekur.
Mánadagin kl. 15.00 í KFUK: Eldrasamkoman við Suna Joensen.
Týsdagin kl. 17.00 í KFUK: Várgleði fyri børnini.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18.00 Evangel. møti. Øll eru vælkomin.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í dag kl. 17.00 Landsbøn, kl. 20.00 Grøðingarmøti.
Í morgin kl. 11.00 Morgunmøti við Sam Jacobsen, kl. 11.30 Barnagudstænasta, kl. 18.00 Evangel. møti.
Mánakvøldið kl. 20.00 Bønarskúlin. Møtiskráin hjá Filadelfia sæst á heimasíðu okkara: www.filadelfia.fo

**Samkoman Immanuel**
Sunnudagin kl. 13.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.00 Møti.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11.00 Halgunarmøti (eingin Sunnudagsskúli). Familjutími kl. 17.00, drekkamunnur aftaná. Øll eru vælkomin.
Mánadagin l. 17.00 og 19.00 Skótamøti.

**Rhema á Hálsi**
Møti og sunnudagsskúli verða sunnudagin kl. 17.00. Á møtinum verður videoupptøka víst á stórskíggja við kenda evangelistinum Jessi Duplantis úr USA. Øll eru vælkomin. www.rhema.fo

**Meinigheitin í Hoyvík**
*uppi á Brekku 3*
Mánadagin bønarmøti kl. 20.30.
Sunnudagin, kl. 11.00 Gudstænasta, kl. 14.00 Sunnudagsskúli.

**Kaldbak**
Missiónsvikan, sum skuldi verða í Kaldbak frá 28. nov til 1. des. 2002, verður flutt til **20. feb. til 23. feb. 2003.**

**Saron, Vestmanna**
Sunnudagin kl. 18.00 Evang. møti við fríum vitnisburði.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarmøti.
Telefonandaktin 424741.

**Missiónshúsið í Hvalvík**
Sunnudagin kl. 14.30 Adventshugni fyri børn, kl. 18.00 Møti við Tórbjørn Láadal o.ø. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21.00 Opið hús við Maibritt Frederiksberg.
Sunnudagin kl. 17.00 Møti við Dánjal á Dul Jacobsen, kl. 17.00 Barnamøti. Vælkomin í Kelduna, www.keldan.fo

**Meinigheitshúsið á Skála**
Í dag kl. 17.00 Barnamøti. Barnakórið syngur, kl. 20.00 Møti við Hanus Lassen, manskór syngur.
Sunnudagin kl. 15.00 Barna- og foreldramøti í kirkjuni við Sólgerð og Signar, barnakórið syngur, kl. 19.00 Møti við Regin Høgnesen trb. Streingjakórið syngur. Innsamling til húsið.

**Lívsins Orð**
Møti verður sunnudagin kl. 10.30 við Símun Jaocbsen.
Mánadagin kl. 20.00 Ungdómsmøti.
Mikukvøldið kl. 20.00 Húsmøti.
Hósdagin kl. 17.30 Tim. 5.
Fríggjadagin kl. 17.15. Barnamøti.

**Eiðis prestagjald**
Hugnaløta verður í Eiðis prestagarði mikukvøldið kl. 20.00, Heri Joensen prestur, hugleiðir.

**Gøta**
Ungdómsmøti verður í kvøld kl. 20.00 v/ Alfred Olsen, Saltnes. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gøta**
Týskvøldið kl. 20.00 Glyvra-Hanusars húsi, bibeltime: 1 Korintherbrev 13, v/ Peter O. K. Olofson.

**Thabor, Fuglafjørður**
Sunnudagin kl. 15.00 Adventshúgni við drekkamunni. Eingin sunnudagsskúli á Kambsdali. Møti við teimum ungu er kl. 18.00 og ungdómsmøti kl. 21.00.

**Betania Skopun**
Leygardagin kl. 11.00 Barnamøti 3-6 ár. Kl. 14.00 Barnamøti 1.-3. fl., kl. 17.00 Barnamøti 4.-6.fl.
Sunnudagin kl. 11.00 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bøn og lovsangur. Kl. 18.00 Møti. Innsavnan til húsið.
Mikukvøldið kl. 20.00 bíbliutími. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**KFUM & K í Klaksvík**
*Missiónsmánaðurin í KFUM & K, Klaksvík, endar hetta vikuskiftið.*
Leygardagin 30. nov. kl. 10.00: Fyrilestur v/ Sólborg Dulavík. Evni: Hvussu møta vit menniskjum í truplari støðu – sum medmenniskju.
Leygarkvøldið kl. 19.30: Møti v/ Marian Kass Nielsen. Sangur: Streingjakórið í KFUM & K. Sunnudagin 1. desember kl. 14.00: Sunnudagsskúli. Sunnukvøldið kl. 18.00: Møti v/ Marius Jacobsen. Sangur: Tabor-kórið av Toftum. Sunnukvøldið kl. 21.00: Ungdómsmøti.

**Soli Deo Gloria**
Leygardagin kl. 13.00 Føðingardagshald fyri vaksin, kl. 17.00 fyri børn.
Sunnudagin kl. 9.30 Sangur og lovprísan, kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 16.00 Møti í skúlanum á Fossanesi, kl. 20.00 Møti í skúlanum á Fossanesi.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarmøti.
Talarar til møtini: Olvheðin Jacobsen, Hjalgrím Davidsen, Annfinn Eliasen og Thomas J. Askham.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið 30. nov. kl. 20.00, talari er Gordon Grieve úr Kanada. Mennirnir eru vælkomnir at vera við.

**Getsemane, Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Møti við Gordon Grieve. Tú ert hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20.00.
Vegna barnagudstænastu verður eingin sunnudagsskúli sunnudagin.
Sunnukvøldið kl. 18.00 Møti við Hallur og Mourits. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn møti. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Betania í Porkeri**
Ungdómsfundur verður í kvøld kl. 20.00.

**Porkeris kirkja**
Talvan gongur sunnudagin fyri Føroysku Sjómanskirkjuna.

**Betel, Vágur**
Sunnudagin kl. 11.00 Breyðbróting, kl. 13.30 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20.00 Bønarfundur.
Ónsdagin kl. 20.00 Uppbyggingarfundur.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 18.00 Evangeliskt møti við Esther Johannesen og Malan Hentze.
Mánakvøldið kl. 20.00 Heimaforbundið.